# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Ísrael eigur at forða øllum nýggjum virksemi í niðursetubygdunum, og allar byggiætlanir mugu sleppast*

*(Condoleezza Rice)*

# Tey bíða í Zimbabwe



*Tey lurta eftir tíðindum frá almennu valnevndini (Mynd: Polfoto)*

**Tað gongur ikki skjótt at telja atkvøðurnar frá valinum í Zimbabwe, men andstøðan ivast ikki í, at hon hevur vunnið**

Sambært teimum seinastu tølunum frá almennu valnevndini hevur andstøðuflokkurin MDC fingið 56 umboð í tjóðartingið, meðan Zanu-PF hjá Robert Mugabe, forseta hevur fingið 53. Men enn vanta úrslitini úr 101 valdømum.

Andstøðan boðaði longu í gjár frá, at hon hevði vunnið bæði forsetavalið og tjóðartingsvalið. Sambært andstøðuni skal leiðari hennara, Morgan Tsvangirai, hava fingið eini 60 prosent av atkvøðunum og Robert Mugabe umleið 30 prosent.

Eitt blað í Suðurafrika almannakunngjørdi í dag eina kanning, sum er grundað á tøl frá einari nevnd, sum hevði eftirlit við valinum. Eftir hesari kanningini fær Morgan Tsvangirai 49,4 prosent av atkvøðunum, og Robert Mugabe fær 41,8 prosent. Verður hetta úrslitið, verður neyðugt við umvali, tí lógin krevur, at eitt valevni skal fáa minst 50 prosent fyri at vinna.

## STUTT SAGT

### Byggja í Jerusalem

Býráðið í Jerusalem hevur gjørt av at fara undir eina stóra byggiætlan í býnum. Í fyrsta umfari er ætlanin at byggja 600 íbúðir til fólk í bygdini Pisgat Zeev, sum er jødisk niðursetubygd á Vestara Áarbakka. Tær 600 íbúðirnar eru partur av einari stórari verkætlan, sum umfatar ikki færri enn 40.000 nýggjar íbúðir, sum sambært býráðnum eru neyðugar fyri at nøkta eftirspurningin. Men tað eru ikki øll, sum eru so fegin um ta stóru byggiætlanina. Bæði USA og ES hava mótmælt, at ísraelsmenn halda fram við at byggja á hersettum lendi, men Ehud Olmert, forsætisráðharri, hevur sagt, at byggingin verður framd.

### Vinir skulu avhoyrast

Í gjár ljóðaði, at portugisiska løgreglan fer at senda fólk til Bretlands at tosa við foreldrini hjá Madeleine McCann, sum hvarv í Portugal tann 3. mai í fjør, men tað avsannaði talsmaðurin hjá hjúnunum, Clarence Mitchell, seinni. Harafturímóti ætla portugisar at avhoyra vinfólk hjá McCann-hjúnunum. Sambært bretskum bløðum skulu bretskir løgreglumenn avhoyra vinfólkini, meðan umboð fyri portugisisku løgregluna eru hjástødd. Eftir ynski frá portugisisku myndugleikunum verður einki sagt um, hvat tað er, sum portugisar ætla at spyrja vinfólkini hjá Mc Cann-hjúnunum um.

### Bjóðar hvíld í grøv

Týski presturin Thorsten Nolting bjóðar sínum sóknarbørnum at hvíla seg í einari opnari grøv í 20 minuttir, so tey kunnu fáa hvíld ta løgtuna frá dagsins stríði og strevi. Thorsten Nolting vil vera við, at ein tílík løta í einari grøv fær fólk at hugsa um tað, sum liggur teimum tyngst á sinni, og hvussu tey kunnu sleppa av við trupulleikan. Presturin vil vera við, at tey, sum hava tikið av sjáldsama tilboði hansara, hava verið væl nøgd við úrslitið.

## Ísland ætlar sær í ST-trygdarráðið

**Ísland hevur søkt um sæti í trygdarráðnum hjá ST og roynir nú at útvega sær undirtøku frá øðrum londum**

Í dag er íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, í New York og heldur fyrilestur um umhvørvi og veðurlagsbroytingar. Í fyrilestrinum, sum Carnegie Council skipar fyri, og sum verður sendur beinleiðis í amerikonskum útvarpi, greiddi forsetin frá teimum ovurstóru avleiðingunum av veðurlagsbroytingunum. Hann legði dent á, hvussu umáðandi tað er, at lond samstarva og vísti í hesum viðfangi á altjóða havrættarsáttmálan sum eitt gott dømi um, at lond kunnu samstarva um mál av felags áhuga.

Men íslendski forsetin hevði eisini onnur ørindi í New York enn at tosa um umhvørvi og veðurlag. Ísland hevur søkt um limaskap í trygdarráðnum hjá ST, og á ferðini í New York skal Ólafur Ragnar Grímsson hitta sendiharrar úr Norðurlondum og londunum við Eystrasalt fyri at fáa stuðul haðani.

Herfyri var íslendski forsetin á almennari vitjan í Meksiko, og tá bað hann Felipe Calderón, forseta stuðla íslendsku umsóknini um sæti í ST-trygdarráðnum.



*Ólafur Ragnar Grímsson, forseti, roynir at fáa lond at taka undir við, at Ísland kann fáa sæti í ST-trygdarráðnum*

## Ónærilig sms-boð feldu finskan ráðharra

**Ilkka Kanerva noyðist frá sum finskur uttanríkisráðharri, tí hann hevur sent einari stripteasedansarinnu ónærilig sms-boð**

Tá finnlendingar í morgun kagaðu í blaðið Hymy, kundu teir millum annað lesa fleiri sms-boð, sum Ilkka Kanerva, uttanríkisráðharri, hevði sent stripteasedansarinnuni Johanna Tukiainen.

Tann 60 ára gamli ráðharrin og tann 29 ára gamla dansarinnan konu at kennast á einari flogferð, og tann næsta mánaðin sendi ráðharrin henni meiri enn 200 sms-boð. Teksturin í boðunum hevur einki beinleiðis tilknýti til kynsligt samband, men kann heldur kallast ónæriligur.

Í hvussu er var formaðurin í Savningarflokkinum, Jyrki Kataninen, skjótur at boða frá, at Ilkka Kanerva kann ikki halda fram sum ráðharri. Seinni boðaði uttanríkisráðið í Helsinki frá, at uttanríkisráðharrin er sjúkur, og at hann verður ikki at hitta í dag.



*Ilkka Kanerva hugsaði seg ikki nóg væl um, tá hann sendi stripteasedansarinnu síni ónærilig sms-boð (Mynd: Polfoto)*